## DAGSINS MEINING

# Spennandi verkætlan

Norðuratlantsbryggjan hevur havt opið hús fyri sínum komandi samstarvsprøtum í Danmark og fyri føroysku pressuni, soleiðis sum greitt er frá á øðrum stað í blaðnum. Hóast sjálvt húsið enn stendur í hálvum gekki, er greitt, at verkætlanin Norðuratlantsbryggjan er eitt sera spennandi og hugfloygt tiltak. Eldsálin í hesi verkætlan er Vígdis Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti Íslands. Leygardagin varð greitt frá tiltakinum, nú hetta mentanarliga flaggskip Útnorðurs fer av bakkastokki um eitt hálvt ár. Í hesum sambandi helt Vígdis Finnbogadóttir mergjaða røðu fyri innbodnum á Den Grønlandske Handelsplads í vikuskiftinum, har eisini Sosialurin var til steðar.

Í stuttum kann sigast, at verkætlanin gongur út uppá at skipa eitt mentanarligt samstarv millum Ísland, Grønland, Føroyar og Danmark úti á gomlu grønlendsku bryggjuni í Keypmannahavn. Talan er eitt kombinerað umboðsstovuhús og eitt mentanarhús. Húsið sjálvt er eitt umleið 250 ára gamalt pakkhús hjá Kgl. Grønlendska handlinum,ið stendur á sunnara armi í havnini í Keypmannahavn stutt frá nýggju operahúsunum. Húsið sjálvt er ein gáva frá danska statinum og hevur verkætlanin annars fingið stuðul frá Grunni A.P. Møllers.

Sum nevnt fevnir Bryggjan um nógv ymiskt virksemi. Her verða íslendsku, grønlendsku og føroysku sendistovurnar, ferðavinna, norðuratlantisk matstova og mentanarligt virksemi. Bryggjan gevur góðar møguleikar at sýna Norðurlondum og Europa, hvat Útnorður hevur at bjóða umheiminum. Bryggjan skal ikki koma í staðin fyri Føroyahúsið,ið hevur annað men ikki minni týðandi virksemi. Hon er eitt supplement og hevur nógvar aðrar uppgávur, sum eru vendar móti umheiminum. Man kann eisini siga, at Bryggjan verður eitt týðandi portur hjá umheiminum í Útnorður.

Bryggjan verður sostatt ikki bert eitt mentanarhús, men ein gluggi hjá Útnorði á europeiska meginlandinum. Hetta gevur føroyskum vinnulívi, ferðavinnu og mentanarlívi góðar møguleikar at marknaðarføra seg í Norðurlondum og í Europa. Hetta er ein sera stór avbjóðing til føroyskt mentanar- og vinnulív. Vit ivast ikki í, at føroysku samstarvspartarnir fara at megna hesa avbjóðing og at teir fara troyta teir møguleikar, sum Bryggjan hevur at bjóða. Men hetta verður eitt tungt tak at fáa at mæla runt, men har viljin og evnini eru, má tað eisini fara at bera til.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lokalpolitikarir í landspolitikki

**Jákup Sverri F. Kass**
*sjálvstýrismaður*

Tað føroyska samfelagið er broytt ómetaliga nógv, síðani løgtingsvallógin frá 1978 kom í gildi. Millum annað hava kommunusamanleggingar fört við sær, at fólk skulu velja bý- ella bygdaráðslim í einum øki og løgtingslim í einum øðrum. Tað kann ikki verða rætt. Ynskja vit eitt dynamiskt og framkomið samfelag, so noyðast vit at broyta lóginar soleiðis, at tær passa til tíðina.

Tað virkar, sum um at lokalpolitikarar vilja berjast av øllum alvi til tess at tryggja sær, at valskipanin ikki skal broytast. Tað sigur seg sjálvt - teir hava nakað at missa.

Spurningurin er, um Føroyar og føroyingar ikki hava meira at vinna, um samfelagið fær landspolitikarar, sum síggja longuri enn til næsta bøgarð. Tað er somuleiðis einki, sum forðar fyri, at suðuroyingar, sandingar, vágamenn, norðurstreymoyingar, eysturoyingar og norðoyingar hava júst líka góðar møguleikar at markera seg og gera seg galdandi landspolitiskt sum suðurstreymoyingar.

Løgtingsvallógin leggur upp til, at tað skullu verða lokal mál, og ikki landspolitisk mál, sum skullu stýra skránni. Eitt nú tá ið figgjalógin skal viðgerast á tingi, so eru tað smámálini, sum upptaka talutíðina hjá flestu tingfólkunum. Størri samfelagslig mál, so sum sosial, vinnulívs og figgjarmál, langtíðarætlanir o.a. fáa ikki nærum so nógva tíð sum t.d. kajkantar og Strandferðslan. Tað er lokalpolitikarirnir í landspolitikki, sum seta skránna!

**Føroyar - *Eitt* valdømi**

Er tað veruligur landspolitikkur og landspolitikarar ein ynskir, so er ein broyting av valskipanini neyðug. Broytingin skuldi í fyrsta umfarið fevnt um at niðurlagt tey sjey valdømini, soleiðis at man fekk eitt valdømi, sum fevndi um allar Føroyar og allar føroyingar. Fingu vit eitt valdømi, so stóðu allir løgtingslimir til svars fyri øllum føroyingum.

Eitt valdømi vildi somuleiðis gjørt tað møguligt at framt langtíðar ætlanir, sum fevndu um alt landi, og ikki bert lappaloysnir.

Grønland er í dag eitt valdømi. Landið er nógvar ferðir størri enn Føroyar, men fólkatalið er næstan tað sama. Veruleikin er tann, at broytingin av valskipanini í Grønlandi ikki hevur fört við sær, at útjarðarin er avtoftaður, men nærmast tvørtur ímóti. Til tess at verða afturvald at tekkjast veljarunum. Hetta hevur skapt eina størri eindarkenslu ímillum býgd og bý - høvuðsstað og útjarðara.

Var Føroyar eitt valdømi, so hevði valstríðið eisini verið merkt av, at politikarar frá øllum landinum gjørdu sum mest burturúr at seta seg inn í viðurskifti, sum komu øllum føroyingum við. Valevnini høvdu ikki havt ráð til at lati vera. Alt Føroyar hevði verið eitt møguligt heimabeitið hjá tí framfysna valevninum.

Frá Føroya Landstýri og sitandi løgmanni er ongin bati at hóma - teir vilja ikki at taka spurningin, um at skipað Føroyar sum eitt valdømi, upp á tingi. Undirritaði hevði ein fyrispurning um hetta mál á tingi í 1999, men løgmaður hevði ikki somu áskoðan.

Tí er at vóna at spurningurin verður tikin uppaftur, soleiðis at hann kann gerast ein partur at politiska og samfelagsliga tjakinum fram til næsta løgtingsval.

# Spælistað? Hvat er tað?

**Heðin Ziska Davidsen**

Hatta havi eg hoyrt fólk siga, og tað er kanska ikki so undarligt, at tey ikki vita, hvat eitt spælistað er fyri nakað. Hvussu skulu tey vita tað? Her er jú einki. Vit, tónleikarar og tónleikaáhugað, hava sóknast eftir einum sovornum, og kanska skuldi man roynt at greitt frá, júst hvat tað er man sóknast eftir. Hetta er mín fatan av, hvat eitt spælistað er ella kann vera.

Man kann seta eitt spælistað upp í móti einum konsertsali og upp í móti eini café/bar, har tónleikur eisini javnan verur framfærdur.

Seta vit fyrst upp í móti eini café/bar, so er tað soðleiðis á slíkum støðum, at man drekkur ein kop av kaffi ella eina øl, og hevur so tónleikin afturvið. Livandi ella ikki. Á einum spælistað er tað hinvegin. Man lurtar eftir tónleiki (helst livandi) og drekkur ein kop av kaffi ella eina øl afturvið. Har er jú ikki tónleikur allatíðina, og tá er tað sum ein vanlig café, men tá tónleikurin er, tá er tað tónleikurin sum er.

Ein konsertsalur er ein pallur við rekkjum av stólum framman fyri. Fólkini koma inn, keypa bilett, heingja frakkar og jakkar í garderobuna og seta seg á sín stól, og hyggja beint fram á pallin. Á einum spælistað eru borð og stólar sett upp. Man kann hava rekkjur av stólum fremst ella ikki. Tað veldst um tónleikin. Fólkini koma inn, keypa bilett, um tað verður kravt, heingja frakkar og jakkar upp, um tey tíma, keypa sær eina øl ella okkurt annað, seta seg við eitt borð og njóta. Ella ikki og fara.

Man kann siga, at spælistaðið liggur ímillum caféina og konsertsalin. Man kemur fyri tónleikin - og samveruna.

Sigast skal eisini, at einki stað avloysir hitt. Tørvur er á caféum, spælistøðum og konsertsalum. Trupulleikin er tann, at her er einki spælistað, og av teirri orsøk, hava vit tónleikarar fört spælistað-rolluna yvir á caféir, og tað er ikki rímuligt. Har eru eisini fólk, sum koma at drekka kaffi og slíkt í frið og náðum, og so koma vit buldrandi. Men tað er tað nærmasta vit hava til eitt spælistað, og vit hava eisini ein ávísan spælitørv, ið skal nøktast.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Yvirlýsing

Fundarluttakararnir taka fult undir við fakfeløgunum í verkfalli teirra, og teimum lønarkrøvum, sum feløgini hava sett fram.

Samstundis átala fundarluttakararnir harðliga, at semingsstovnurin, saman við arbeiðsgevarafeløgunum, royna at hótta við at senda semingsuppskotið til uratkvøðugreiðslu, hóast semingsmenninir eru vitandi um, at leiðslurnar í fakfeløgunum hava fulla heimild at taka støðu til semingsuppskotið vegna limirnar í feløgunum.

Fakfeløgini átala harliga, at Arbeiðgevarafelagið leggur seg út í innanhýsis viðurskifti hjá Arbeiðarafeløgunum. Vit spyrja tí, hvar okkara demokrati er tá Arbeiðsgevarafelagið saman við semingsstovninum skal avgerða um eitt semingsuppskot skal til uratkvøðu ella ikki - hvat hava vit tá fakfeløgini til !

Fundurin staðfestir, at einki fordømi er um, at semingsmaður hevur avgjørt, at semingsuppskot skal sendast út til uratkvøðugreiðslu, um ikki bæði arbeiðsgevarasíðan og løntakarasíðan hava tikið undir við hesum, og tí er hóttanin frá verandi semingsmanni ein greið ábending um, at tað eru áhugamálini hjá arbeiðsgevara-síðuni hann røkir, nú hann setir fram slíkar hóttanir.

Fundurin vísir á, at sambært semingslógini kann eitt semingsuppskot, sum sent er út til uratkvøðugreiðslu, verða kroyst niður yvir løntakararnar, hóast meirilutin av teimum sum atkvøtt hava, er ímóti uppskotinum, og tí skilja vit væl, at arbeiðsgevarasíðan trýstir á semingsstovnin fyri at fáa uppskotið sent út til slíka atkvøðugreiðslu.

Fundarluttakararnir eru samdir um, at fakfeløgini ikki eiga at medvirka til, at lønarviðurskiftini hjá limunum verður avgjørt á ein so ódemokratiskan hátt, sum uratkvøðugreiðslan er.

Tórshavn, 24. mai 2003
**Arbeiðarafeløgini í verkfalli**

# Reglurnar um uratkvøðu í Føroyum eru avoldaðar og ódemokratiskar

Fakfeløgini hava áður vístá, at føroysku reglurnar um uratkvøðu er ódemokratiskar og ótíðarhóskandi.

Í Føroyum er eitt semingsuppskot, sum sent verður út til ur-atkvøðugreiðslu samtykt, um t.d. 25 % av løntakarunum luttaka í atkvøðugreiðsluni og 100 % atkvøða ímóti.

Um t.d. 45 % av løntakarunum luttaka í uratkvøðugreiðsluni, so er uppskotið samtykt um 66% atkvøða ímóti.

Hetta er tí ein skipan, sum er bæði ódemokratisk og ótíðar-hóskandi.

Í grannalondum okkara, t.d. í Danmark er skipanin øðrvísi, tí har valdar vanligur atkvøðumeiriluti, tó soleiðis at um minni enn 40 % av løntakarunum luttaka í uratkvøðugreiðsluni, so er er uppskotið samtykt um ikki minst 25 % av teimum sum hava atkvøðurætt hava atkvøtt ímóti.

Tað er vælskiljandi, at arbeiðsgevarasíðan er so altrá eftir at fáa semingsstovnin at senda semingsuppskotið til uratkvøðu, men tað er óskiljandi, at semingsmenninir so mikið sum hugsa um at brúka eina so avoldaða og ódemokratiska skipan, og tí er tað ikki at undrast á, at fakfeløgini vísa sína missnøgd.

**Arbeiðarafeløgini í verkfalli**

# Rætting til úttalilsir hjá leiðaranum á Fiskiveiðieftirlitinum

TÍÐINDASKRIV
*Maskinmeistarafelagið*

Í fjølmiðlunum í gjár upplýsti leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum, at øll viðurskifti vóru komin í rættlag, áðrenn maskinmeistararnir søgdu seg úr starvi tann 28. februar og at hann ikki skilti, hvat ósemjan snúði seg um.

Tað uppskot til sáttmála, ið Maskinmeistarafelagið hevur mett at kunna vera nøktandi, er komið við telduposti frá Fíggjarmálaráðnum tann 26. apríl t. v. s. slakar 2 mánaðir eftir, at maskinmeistararnir høvdu sagt seg úr starvi.

Vit mugu sostatt tíverri staðfesta, at leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum ber beinleiðis ósannindir til fjølmiðlarnar.

# Ikki meira snakk, men peningur

**Tað er altið positivt at tosað verður um trivnað, men í løtuni er trupuleikin vantandi politiskur vilji**

**John William Joensen**
*formaður í Norðoya Sambandsfelag*

Tíverri kundi eg ikki luttaka á almenna fundinum í býráðshøllini í seinastu viku, men eg havi havt sera stóran áhuga fyri viðurskiftunum hjá Ítróttini í Klaksvík.

Eg havi alla virðing fyri at býráði vil hoyra sjónarmið hjá borgarunum, men tað er ein sannroynd, at hesi sjónarmið eru longu vælkend í býráðnum, og tí er trupult at fáa eygað á seriøsitetin aftan fyri borgarafundirnar.

Formaðurin í Mentunarnevndini, Jórun Høgnesen, sigur í Sosialinum, at feløgini sjálvi eiga at taka stig til at fáa til vega betri umstøður: "Tað er ikki neyðugt at kommunan fíggjar alt einsamøll; tað hevur hon ikki orku til."

Tað skal her verða skorið út í papp at feløgini hava ikki størri fíggjarliga orku enn til raksturin, og at flestu ítróttarfeløg í býnum eru húsvill.

Eisini hava aðrir lokal politikarar melda út, at teir fara ikki at ganga við til, at brúka meira pening til ítróttina.

Formaðurin í mentunnarnevndini hevur eisini gjørt greitt, at tann peningurin, sum hon umsitur, skullu brúkast til fólkaskúlan.

Tá politiski viljin ikki er til staðar at brúka fleiri pengar til mentan og ítrótt, so kann tað bert uppfatast sum ein roynd hjá býráðnum at skapa tað fatan at naka hendir á økinum.

Mín áheitan til trímannabólkin, ið arbeiðir við "ítrótti, mentan og frítíð" skal tí vera, at tey fyrst finna út av hvussu stórur tann politiski viljin er at gera íløgur í økið og hvat hetta merkir í krónum og oyrum.

Verðuleikin í løtuni er tann, at vit hava einki mentunnarhús, og at karmarnir hjá ítróttini ikki eru betraðir síðani fimleikarhøllirnar og svimjuhøllin bleiv bygd í fyrru hálvu av 70-unum.

Stuttsagt, eigur orðaskifti ikki at snúgva seg um hvat lokalir felagskapir ynskja, tí tey ynskini kenna øll.

Enn styttri sagt: "Ikki meiri snakk, men meiri pening og politiskan vilja!"

# Samgongan lamskotið Føroyar

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*

Fyri stuttari tíð síðani, hevði samgongan ráð at stjala eina millión krónur dagliga frá føroyinginum við at skerja ríkisveitingina.

Nú hoyra vit so Karstin Hansen siga alment, at "samfelagið hevur ikki ráð" - at gjalda lønhækking.

Men hví skal lønin upp? Tí loysingarsamgongan krevur alt ov høgar skattir og avgjøld. Vegna loysingina. Sum so aftur útholar reallønina hjá fólki.

Ja, skattirnir eru so høgir, at vandi er fyri at kappingarføri rýkur. Og hesum hevur sitandi samgonga alla ábyrgdina av.

Sannleikin er, at vit í Føroyum enn hava eitt kreppu háskattatrýst, hóast kreppan ikki er longur. Vandi er tó fyri, sum vanligt, at vit fáa eina nýggja kreppu, eftir at Tjóðveldið hevur stýrt saman við Fólkaflokkinum í nøkur ár!

Ein kann spyrja hví samfelagið ikki hevur ráð. Og vit kunnu spyrja, um vit høvdu ráð til at samgongan uttan nakra konsekvensútgreining kutaði 1/3 av ríkisveitingini. Tí tað høvdu vit ikki ráð til, eftir meting hjá Sambandsflokkinum. Og ikki ein einasta útrokning fyriliggur, ella var fyriløgd Løgtinginum, hóast nógvar spurningar um hesi viðurskiftir. Hægsta mál K Hansens og øðrum loysingarvandalum eru at stjala enn meiri frá samfelagnum, og so senda rokningina fyri hetta sum hægri skatt og lægri løn til føroyingar.

Og nú eru so ikki "ráð" at gjalda eina lønarhækking, so at kompensatión fæst fyri økt avgjøld í sitandi samgonga er orsøkin til. T.d.

- eitt økt SVF avgjald, ið núsitandi samgonga álegði hvørjum húski (1000 kr áðrenn skatt).
- mótrokning fyri, at arbeiðsgevarar skulu gjalda tveir teir fyrstu sjúkradagarnar (einar 6 milliónir krónur).
- Timalønt húskir í fáa børn, verða stolin fyri 10-12 milliónir krónur, tí útrokningarhátturin er broyttur og beinleiðis rættaður ímóti teimum tímalønntu.
- At tíggjutals milliónir kr av útreiðslum eru fluttar til kommunurnar.
- Soleiðis kann ein halda fram. Núsitandi samgonga hevur framt ein beinleiðis skaðiligan lands og arbeiðarapolitikk. Við at hava góð ráð at blaka pening av landinum, og síðan senda rokningina til arbeiðandi fólk, pensionistar o.o.
- Samlaða skattatrýstið er eitt av teimum hægstu í heiminum. Tað eigur at lækkast.

Fólkaflokkurin megnar ikki at fremja hendan setning saman við Tjóðveldinum. Og loysingin hevur bert øktar skattir og verri liviumstøður at bjóða føroyingum. So einkult er tað.

Landið lamskotið:

Aðruhvørja løtu er landið lamskotið av verkføllum, ið eru neyðug til tess at tryggja arbeiðandi fólki her á landi nøkulunda livikor. Men ábyrgdina fyri, at landi í tíð og ótíð er lamskotið av verkføllum eigur bert sitandi samgonga, ið meira hugsar um at yvirtaka og senda enn størri rokningar til føroyingar, heldur enn at hava sum høvuðsuppgávu at bøta um livikor føroyinga.

Sambandsflokkurin hevur til endamáls at bøta um livikor og viðurskiftir føroyinga - og tí vilja vit onki hava við loysingina at gera.

Okkara politikkur hevði tryggja betri og stabil viðurskiftir bæði hjá arbeiðandi fólki og vinnu. Við lægri skattatrýsti. Tí samfelagið hevur tað bert gott um bæði vinna og fólk hava tað gott. Okkara politikkur hevði avgjørt givið eitt betri grundarlag hjá bæði arbeiðandi føroyingum og vinnu. Og helst hevði ikki verið neyðugt at streika so ofta - tí tað var óneyðugt fyri báðar partar.

Loysing oyðileggur - Samband styrkir og gevur nødsemi.